# Tað hevur gingið betu



*Ítróttarhøllin í Runavík verður karmur um sjálva vinnustevnuna, FarpExpo, sum í næstu viku verður hildin í Runavík á fimta sinni*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




*- Tað hevur gingið rímiliga væl at fáa fyritøkur at taka lut á stevnuni hesaferð – kanska betri, enn vit høvdu væntað, nú fíggjarligu umstøðurnar kring um okkum hava verið so ótryggar, sigur Símun Hammer, stjóri í Virkisráðgevingini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Vinnustevnan FaroExpo er vaksin á hvørjum ári – ikki nógv, men við nøkrum fáum fyritøkum. Í ár er stevnan størri enn nakrantíð áður við sløkum 55 luttakandi fyritøkum, stívliga 30 úr Føroyum og umleið 20 úr skandinavisku londunum. Ísland, sum ikki var við í fjør, er umboðað við ikki færri enn fimm fyritøkum á stevnuni hesaferð**

Í komandi viku verður FaroExpo hildin á fimta sinni í Runavíkar kommunu. Tað er ítróttarhøllin í Runavík, sum er karmur um sjálvt fundarvirksemið, og síðan verður nýggja Løkshøll fyri fyrstu ferð karmur um teir fyrilestrar, sum verða hildnir, meðan stevnan er.

Fyrilestrarvirksemið hevur øll hini árini verið í Kelduni í Skálafirði, men nú kommunan hevur fingið stórt og snotuligt mentanarhús, sum Løkshøll er, skapar hetta nýggjar møguleikar, bæði sum fyrilestrarhøli og sum karmur um fleiri tiltøk á fjølbroyttu mentanarvikuni.

Símun Hammer, stjóri í Virkisráðgevingini, sum vegna Eysturoyar Vinnulívsfelag og Runavíkar kommunu stendur sum samskipari av FaroExpo, ásannar, at tað verður høgligari, nú luttarkar á stevnuni bert skulu vestur um Løkin til fyrilestrarnar.

Hann væntar eisini, at tað fer at rigga væl, nú fleiri tiltøk verða at finna undir sama taki í Løkshøll.

## Stevnan veksur

Tað eru Eysturoyar Vinnulívsfelag og Runavíkar kommuna, sum formelt standa aftanfyri FaroExpo.

- Upprunaligi tankin var at skapa eitt hvørt tiltak her í kommununi, sum í støðd og innihaldi hóskaði til økið og sum kundi draga fólk higar. Tankin var, at vinna og mentan kundu ganga hond í hond, sum tikið verður til, soleiðis at skilja, at talan bæði var um ein vinnuligan og ein mentarligan part um somu tíð.

Símun Hammer sigur, at luttøkan á FaroExpo er vaksin á hvørjum ári – ikki nógv, men við nøkrum fyritøkum.

- Nú hevur vinnustevnan verið hildin á hvørjum ári hesi fimm árini, men tankin við mentanarvikuni var og er eisini, at sjálvt um FaroExpo ikki hevði verið á hvørjum ári, skuldi mentanarvikan kortini haldast sum áður.

Úti í heimi er ikki óvanligt, at stórar vinnustevnur eru annað hvørt ár, og tað eru eisini tær, sum verða hildnar við nøkrum árum ímillum, eitt nú velduga stóra fiskivinnustevnan í spanska býnum, Vigo.

- Vit hava tó ongar ætlanir um, at FaroExpo ikki eisini verður hildin komandi ár – á sætta sinni, sigur Símun.

## Ísland er við

Á FaroExpo hesaferð verða út við 55 fyritøkur úr Føroyum og serliga úr londunum í Skandinavia. Orsøkin til, at flestu útlendsku fyritøkurnar eru úr Skandinavia er, at fyrireikararnir serliga venda sær til fyritøkur í londunum uttanum okkum. Hinvegin eru eisini fyritøkur við, sum umboða aðrar fyritøkur langt burtur.

- Føroysku fyritøkurnar eru stívliga 30 í tali, og flestu av hesum hava verið við áður. Onkur fyritøka er kortini nýggj. Tað vil so vera, at onkur er við í eitt ár og kanska ikki árið eftir. Hinvegin eru fleiri, sum hava verið við á hvørjum ári.

Símun sigur, at í fjør var eingin íslendsk fyritøka við, men hesaferð eru tær fimm í tali, og tær umboða bæði tænastur og framleiðslur.

Spurdur, hvør orsøkin man vera til, at íslendskar fyritøkur júst eru við í ár, nú landið er so hart rakt av fíggjarkreppu, sigur stjórin í Virkisráðgevingini:

- Tað er sjálvandi ilt at siga. Eitt er, at íslendskar fyritøkur kanska í størri mun venda sær úteftir heldur enn inn eftir. Hin møguleikin er, at íslendingar – tó at teir eru hart raktir – kortini hava orku og vilja til at arbeiða seg burtur úr trupulleikunum. Hetta kann eisini vera ein samantvinning av báðum, leggur hann aftrat.

## Væl fyriskipað

FaroExpo er ikki ein framsýning, men ein stevna, har fundarborðið er miðdepilin. Stevnan byggir neyvt á avtalaðar fundir millum seljarar og keyparar, sum hittast í